## Høgt træ tendra

**Í Vági hava tey í ár eitt høgt jólatræ at tendra, tí træið er heilar 12 metrar**

JÓL
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ójavnt er, hvussu tey ymsu jólatrøini eru, ið koma til landið. Í Vági eru tey tó væl nøgd í ár, tí træið er óivað millum tey hægstu í landinum, og sera vakurt eisini.

Stóra træið í Vági verður tendrað fríggjakvøldið klokkan 19. Har verður sangur við Frelsunarherinum, ið eisini hevur jólatræ og kakao og bollar í Framtíðini. Jólamenn vitja og koma við jólaskipinum og borgarstjórin, Kirstin Strøm Bech, heldur røðu.

---

## Jólakonsert í Fríðrikskirkjuni

JÓLAKONSERT
*tíðindaskriv*

Nú sunnukvøldið klokkan 20:00 verður konsert í Fríðrikskirkjuni undir leiðslu av Jóhan Mortensen.

Kórið hjá Jóhan, ið telur einar 35 sangarar, ið mest koma úr økinum kring Skálafjørðin, fer henda annan sunnudag í advent at royna at seta jóladám á í kirkjuni úti á Toftum. Kórið hevur øll hesi síðstu mongu árini verið ein fastur táttur í jólakonsertskránni í Fríðrikskirkjuni. Á skránni er bæði føroyskt og útlendskt tilfar. Okkurt nýtt føroyskt jólalag verður at hoyra, eins væl og J. S. Bach verður umboðaður við "Jesus bleibet meine Freude". Martin Restorff Jacobsen hevur klaverfylgispælið.

Tveir hornnæmingar úr Nes Sóknar Musikkskúla fara at framføra hvør sítt solostykki. Jóngerð Olsen spælir eina romansu burtur úr eini hornkonsert hjá Mozart, og Áki Hansen spælir eitt stykki av G.F. Händel. Eisini her hevur Martin R. Jacobsen klaverfylgispælið.

Nakrar gentur úr 5. og 6. flokki fara at ganga luciagongd.

# Havhestur sær ikki mu

**Havhestur um okkara leiðir hevur munandi minni av ruski í maganum enn havhestur syðri og eystari í Norðsjónum og í Skagerak. – Men flestu høvdu helst roknað við, at munurin var størri, sigur fuglafrøðingurin, Bergur Olsen**



KANNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bergur Olsen, fuglafrøðingur, hevur skrivað eina grein, sum liggur á heimasíðuni hjá Fiskirannsóknarstovuni. Greinin snýr seg um rusk á havinum og rusk, sum funnið er í havhestamagum.

Hann vísir á, at nøgdin av ruski, sum funnin er í magum á havhesti, er størst í landsynningshorninum av Norðsjónum.

- Tað sæst, at ruskið minkar longur norður, tú kemur, men kortini hava føroysku havhestarnir ein fjórðing av tí ruski í maganum, sum havhestarnir hava sunnast í Norðsjónum. So heilt reint er ikki, og flestu mundu helst roknað við, at munurin var størri, staðfestir fuglafrøðingurin.

### Nógv plastik

Hyggja vit at, hvussu nógv pettir av plastikki eru í magunum, er munurin millum Norðsjógvin og okkara havumhvørvi størri.

- Í miðal hevur ein havhestur í Norðsjónum 44 plastikpettir í maganum. Hinvegin hevur ein føroyskur "bert" sjey, sigur fuglafrøðingurin.

Í londunum kring Norðsjógvin verður nøgdin av plastikki og øðrum ruski, ið verður funnið í maganum á sjálvdeyðum havhesti, nýtt sum eitt mát fyri, hvussu dálkaður sjógvurin er.

- Ætlanin er, at hesar kanningar skulu halda fram, soleiðis at tær kunnu vísa gongdina í royndunum at minka um dálkingina av havinum. Hetta tiltak, sum ES stuðlar, verður rópt, "Save the North Sea".

Føroyar eru við í hesum kanningum fyri at hava eitt mát fyri, hvussu nógv rusk er í havhesti uttanfyri Norðsjógvin – ella í einum reinum havi, sum okkara havøki ofta verður rópt.

Sera góðir møguleikar eru at fáa hendur á magum til kanningar í Føroyum, tí her verður havhestur veiddur. Í hinum londunum verða magarnir tiknir úr sjálvdeyðum fugli.

### Skráseting

Tað er Fiskirannsóknarstovan, sum umboðar Føroyar í hesum arbeiði, og stuðul hevur verið veittur av játtanini til umhvørvisverndartiltøk frá Innlendismálaráðnum.

- Men stórur partur av havhestunum og magunum er fingin til vega við ókeypis hjálp frá eitt nú Jens-Kjeld Jensen og Poul Johannis Joensen, vísir fuglafrøðingurin á.

Hann sigur, at skrásetingin av ruskinum í magunum verður gjørd í Texel í Hálandi, meðan restirnar av rættari føði, sum er í magunum, verða sendar



*Tey ótu leskiligan bowling-búff, áðrenn farið varð út á breytina at kasta kúlur*

*Mynd: Súsanna Joensen*

# Bindiklu bowling-búf

**Einki er at taka seg aftur í, at nýggja Bowling-høllin í Leirvík hevur drigið nógv fólk til sín, síðan høllin læt upp**

BOWLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var gott lag, og fólk stuttleikaðu sær ófort, tá ið Sosialurin hugdi inn á gólvið í nýggju Bowlinghøllini í Leirvík mikukvøldið.

Í tí partinum av hølunum, har møguleikar eru at borðreiða, sótu fólk og ótu leskiligar bowling-búffar aftur við ymiskum góðum, bæði turrum og vátum.

Hetta vóru bindiklubbar í Leirvík, annar við makum og hin ikki.

Eftir at búffar og leskandi var fingið niður um, varð farið út á tær seks breytirnar at stuttleika sær.

Og stuttligt sá tað út til at vera. Ikki bara hjá teimum, sum áttu tørnið at kasta, men so sanniliga eisini hjá